## Rudduligur sigur til Frakland

Georgia kom rættuliga niður á jørðina aftur, eftir at teir í fyrstu royndini í nýggju EM undankappingini høvdu vunnið 6-0 á Svangaskarði. Leygardagin hevði Georgia vitjan av Fraklandi. Varaheimsmeistararnir vóru væl upplagdir, og teir fóru til hús aftur við 3-0 sigri. Florent Malouda setti hol á í 7. minutti. Louis Saha økti til 2-0, tá ið eitt korter var farið, og í fyrsta minuttinum eftir steðgin vóru teir í Georgia so óhepnir at gera sjálvmál. So var Frakland á odda 3-0, og tað komu ikki fleiri mál. Mikukvøldið skal Frakland spæla á heimavølli móti Italia, og Georgia skal spæla á útivølli móti Ukreina.



## Nýggjur liðformaður móti Litava

Jógvan Martin Olsen og hansara menn hava ivaleysa nógv at hugsað um, eftir at landsliðið hevur tapt tveir teir fyrstu dystirnar 6-0 og 6-0. Í Skotlandi vóru tríggjar broytingar gjørdar sammett við, tá ið spælt varð móti Georgia á heimavølli. Longu nú er tað greitt, at í hvussu so er ein broyting fer at verða gjørd, tá ið Føroyar leygardagin 7. oktober klokkan 15 fara at spæla á Tórsvølli móti Litava. Liðformaðurin Óli Johannesen fekk gult kort í Skotlandi í dag. Tað fekk hann eisini í heimadystinum móti Georgia. Harvið er greitt, at hann verður leikbannaður móti Litava.

# Fýra av tíggju hava mist høvdið

**Tá ið tað ræður um at geva venjarunum sekkin, minnir føroyski fótbóltsheimurin nógv um, hvussu tað gongur fyri seg aðra staðni**

SEKKJAÐIR VENJARAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Úrslitini hjá landsliðnum eru ikki so góð, sum tey viðhvørt hava verið áður. Í landsliðshøpi kann sigast, at Føroyar dragna frá hinum europeisku londunum. Tá ið tað ræður um at geva venjarunum í feløgunum sekkin, tykist eingin munur at vera á føroysku fótbóltsfeløgunum og teimum aðra staðni. Har er tað skjótt, at venjararnir missa høvdið, um tað ikki gongst væl, og soleiðis er tað eisini í Føroyum.

Trygvi Mortensen er fjórði venjarin av tíggju í Formuladeildini, sum hevur fingið sekkin í hesum kappingarárinum. Og NSÍ er tað felagið, sum liggur hægst á støðutalvuni, tá ið venjarin hevur fingið sekkin.

Fyrsti venjarin at missa høvdið í ár var Jóannes Jakobsen. Hann varð sagdur úr venjarastarvinum í B68 áðrenn summarsteðgin. Edmund Jacobsen og Julian Johnsson høvdu ábyrgdina, og síðani summarsteðgin hevur Bill Jacobsen verið B68 venjari.

B68 var á niðurflytingarplássi, tá ið venjarin varð uppsagdur. Tað var ÍF eisini, tá ið teir í summarsteðginum søgdu Petur Simonsen úr starvinum. Nýggjur ÍF venjari var Jón Simonsen, sum frammanundan var hjálparvenjari, og hann hevur havt leiðsluna saman við verjuálitinum Símuni Eliasen.

### Eitt felag yvirlivir

Triðja felagið at siga samstarvið við venjaran upp var VB/Sumba. Eftir at Ole Andersen hevði fingið sekkin, høvdu fyrst Eyðun Jacobsen og Bjarni Johansen ábyrgdina í einum dysti, og síðani hava tað verið Bjarni Johansen og Finn Johannesen, sum hava verið VB/Sumba venjarar. VB/Sumba var á áttanda plássi, tá ið venjarin varð sagdur úr starvinum.

Og nú er tað altso Trygvi Mortensen, sum er avhøvdaður sum venjari í Runavík. Hann er samstundis tann fyrsti, sum avtalan fyri 2007 eisini er strikað við.

NSÍ er á fimta plássi, nú venjarin er sagdur úr starvi. Tað eru fýra stig fram til næstfremsta plássið, nú tað eru seks umfør eftir at spæla. NSÍ hevur tapt tríggjar tær seinastu ferðirnar. Harvið er tað greitt, at liðið ikki fer at røkka FM heitinum, sum teir í Runavík so fegnir vilja vinna.

Nú eru teir farnir at leita eftir tí venjaranum, sum teir rokna við næsta ár verður førur fyri at leiða teir fram til fyrsta FM heitið nakrantíð.

Í hinum trimum feløgunum, sum hava skift venjara, er spurningurin, hvør teirra fer at verða førur fyri at sleppa sínum liði undan at flyta niður. Tað verður bara ein teirra, sum fer at megna tað.



*– Eg standi rættiliga spyrjandi eftir hesa uppsøgnina, sigur Trygvi Mortensen, sum nú er fyrrverandi NSÍ-venjari*

# – Eg standi spyrjandi

**Trygvi Mortensen er sekkjaður sum venjari í NSÍ, og óváttað tíðindi vilja verða við, at arbeitt verður við at fáa Johan Nielsen at venja NSÍ næsta kappingarár**

NSÍ VENJARIN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Trygvi Mortensen er ikki longur venjari hjá NSÍ. Leiðslan í felagnum boðaði fyri viku síðani venjaranum frá, at hann skuldi ikki venja NSÍ næsta ár, hóast partarnir høvdu avtalu um tað. Felagið vildi tó lata venjaran gera hetta kappingarárið liðugt, men tað vil hann ikki.

– Nevndin boðaði mær á fundi herfyri frá, at teir vildu sleppa burturúr sáttmálanum um samstarv, sum vit høvdu fyri 2007. Tá lá í kortunum, at eg skuldi hava ábyrgdina restina av hesum árinum. Eg vandi liðið nakrar ferðir í síðstu viku, men nú hava ávís viðurskifti millum nevndina og meg borið við sær, at eg havi sagt stopp og gevist beinanvegin, sigur Trygvi Mortensen.

– Eg standi rættiliga spyrjandi eftir hesa uppsøgnina, tí vit hava lagt eina strategi, sum vit hava arbeitt eftir. Eg havi havt ábyrgdina av bæði unglingaliðnum og 2. liði eisini, og har hava úrslitið verið heilt góð. Nú verður alt hetta arbeiðið slept, bara tí at úrslitini í teimum seinastu trimum dystunum ikki hava verið nóg góð, sigur hann.

### Bogi og Arnfinn taka við

NSÍ váttaði í gjárkvøldið, at Trygvi Mortensen er givin sum venjari í felagnum, og at ein nýggj venjaraloysn er klár. Bogi Lervig, sum hevur verið hjálparvenjari hjá Trygva Mortensen, skal saman við Arnfinn Langgaard venja Formulaliðið hjá NSÍ tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

– Eg haldi, at nevndin kundi havt bíðað til eftir kappingina at tikið venjaraspurningin upp. NSÍ hevur framvegis møguleikan at fáa eina góða endastøðu í Formuladeildini, sigur Trygvi Mortensen.

– Vit hava tapt seinastu tríggjar dystirnar, men vit hava ikki havt marginalarnar við okkum. Vit hava manglað onkrar profilar, og bara í seinasta dystinum kann sigast, at vit høvdu ein off-dag, sigur hann.

### Johan spøkir

Tað hevur ikki eydnast at fingið tíðindini váttað frá nevndini í NSÍ, men væl vitandi keldur í Runavík vilja vera við, at ein greiður favorittur er til venjarastarvið í NSÍ næsta kappingarár. Felagið hevur seinastu dagarnar havt samband við royndasta og mest vinnandi føroyska venjaran. Hann eitur Johan Nielsen.

Johan Nielsen hevur seinastu árini verið venjari á Skála, og har hava úrslitini verið heilt góð. Í fjør var Skála við í stríðnum um FM-heitið, og tað var líka við, at felagið endaði ovast á stigatalvuni. Í ár hevur ikki gingið heilt so væl, men eingin ivi er um, at arbeiðið, sum Johan Nielsen hevur gjørt á Skála, hevur verið framúr gott.

Nú vónar leiðslan í NSÍ, at Johan Nielsen næsta ár fer at standa á odda fyri liðnum, tá ið teir fara at gera enn eina roynd at fáa fatur á FM steypinum.